


# Sethús

## Undir Ryggi 12, 100 Tórshavn

| 59 | 40 | 3 | 2 | Fyrst í 1900 |
|---|---|---|---|---|

Mitt í søguríka og hugnaliga umhvørvinum í Havn stendur ein sonn siðbundin og vøkur perla. Svørtu, flagtaktu húsini við sprossavindeygnum vórðu bygd fyrst í síðstu øld, dagførd og umvæld millum 2013 og 2017 og hava varðveitt siðbundna, føroyska stílin, bæði innan og uttan.

Serstøku húsini, sum standa undir Ryggi, hava nakað av útsýni. Húsini eru í trimum hæddum, har mið- og ovara hæddin er innrættað. Í miðhæddini er durur, køkur, stova og trappugongd til ovaru hæddina. Í ovastu hæddini er trappugongd, gongd, baðirúm og 2 rúmlig kømur. Í niðastu hæddini er lágt kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm.

Uttanfyri er vakurt umhvørvi og hóast nærumhvørvið er friðarligt, so er skjótt at spáka sær ein túr oman í lívliga og blómandi mentanar- og handilsumhvørvi.

**Prísuppskot 3.995.000 kr.**

| Dømi um fígging: Afturgjaldstíðin er 25 ár | |
|---|---|
| Útgjald, 10% | **395.000 kr.** |
| Mðr. gjald – áðrenn rentustuðul | **21.578 kr.** |
| Mðr. gjald – eftir rentustuðul | **19.188 kr.** |

Útrokningin er vegleiðandi. Vit taka støði í, at rentan er óbroytt alt tíðarskeiðið á 4,95% fyri alla lánsupphæddina, og at rentustuðul er 35%. Rentustuðul verður bert veittur til egnan bústað. Hædd er tikin fyri vanligum kostnaðum, so sum stovningarprovisión, tinglýsing og avgreiðslugjøldum.

Lýsing av ognini

Kortalmynd



## Lýsing 1

| | |
|---|---|
| Fyriliggur húsaskoðan og seljarans upplýsingar | Ja |
| Bjóðar seljari eigaraskiftistrygging galdandi í 5 ár | Ja |

| | |
|---|---|
| Slag | Sethús |
| Byggisamtykt | Tórshavnar Kommuna: Umráði 2 – 2 grundumráði |
| Matrikkul | 590 Tórshavn |
| Grundøki stødd | 40 $m^2$ sambært tingbókarváttan |
| Uttandura mát av ognini | 81,5 $m^2$ sambært húsaskoðan |
| Byggiár | Fyrst í 1900-talinum |
| Hæddir | 3 |

| | |
|---|---|
| Tekningar | Nei |
| Stoppikrani | Í kjallaranum |
| El-mátari 1 | Í kjallaranum |
| Atgongd til ovasta loft | Ja |
| Kort | www.kortal.fo |
| Rottangi | Felags |
| Eigari/ar síðan | 09.11.2012 |
| Er leigari í ognini? | Nei |
| Nær kann yvirtøkudagur væntast at vera umleið? | **1-2 mánaðir eftir at keypsavtala er gjørd** |
| Verður ognin vaskað og ruddað áðrenn yvirtøkuna? | Nei |

## Umsiting

| | |
|---|---|
| Framdar umvælingar | - Skift alt el og hvs í 2013-2017<br>- Skift 4 vindeygu í 2013-2017<br>- Nýggjan køk – 2013-2017<br>- Partur av klædningi og takrennur er skift – 2013-2017<br>- Oljutanga og ketil – 2013-2017<br>- Nýggjan málara – 2013-2017<br>- Øll gólv í húsunum eru skift – 2013-2017<br>- Innan er nærum alt skift og gjørt av nýggjum fyriuttan at tey hava latið nakað av gamla viðinum verða verandi – 2013-2017<br>- Lagt rør til gólvhita í duri í miðhædd, tó ikki sett til |
| Møguligar umvælingar | Sí húsaskoðan og seljarans upplýsingar |
| Eru onnur týðandi viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri keypara, ið ikki eru lýst í seljarans upplýsingum, so sum trupulleikar við skaðadjórum, fukti, bygging, lekum, el o.s.fr.? | |

## Innrætting

| | | |
|---|---|---|
| Ovasta hædd | 28,5 m$^2$ | Gongd, trappa, 2 kømur og baðirúm |
| Miðhædd | 30,2 m$^2$ | Durur, køkur, stova og trappugongd |
| Niðasta hædd | 22,8 m$^2$ | Lágur kjallari / fýrrúm / vaskirúm |
| Umhvørvi | | Hugnaligt umhvørvi |
| Grannalag | | Gott grannalag |
| Parkeringspláss | | Nei. Tó eru tað fleiri almenn parkeringspláss tætt við, við møguleika fyri parkeringsloyvi |
| Prísuppskot | | Kr. 3.995.000,00 |

## Lýsing 2

| | |
|---|---|
| Bilhús | Nei |
| Hjallur | Nei |
| Tilbygningur | Nei |
| Krúpikjallari | Ja |
| Tak | Flagtak |
| Loft | Timbur |
| Álegging | Timbur |
| Vindeygu | Timbur |
| Termorútar | Ja og nei. Tey gomlu vindeyguni hava ikki termorút |
| Úthurðar | Timbur |
| Klædningur | Timbur |
| Innveggir | Timbur |
| Innhurðar | Snikkaragjørdar úr timbur |
| Trappa/ur | Timbur |
| Grund | Laðað grund |
| Rør-/hitaskipan | Kopar |
| Brúsa | Nei |
| Baðikar | Ja |
| Hitaskipan | Oljufýring |
| Oljutangi | Ja, sergjørdur frá Tangavirkinum |
| Brenniovnur | Nei |
| Luftskipan / ventilatión | Nei |
| Køkur | Ja, í miðhæddini |

| | |
|---|---|
| Telefon | Nei |
| Internet | Nei |

## Við í søluni

| | |
|---|---|
| Ovnur | Ja |
| Roykhetta | Ja |
| Køli/frystiskáp | Ja |
| Frystiboks | Nei |
| Uppvaskimaskina | Ja |
| Vaskimaskina | Nei |
| Turkimaskina | Nei |
| Fluguskápi | Nei |
| Skrellispann | Nei |
| Postkassi | Nei |
| Gardinur | Ja |
| Annað | Tilfar til rekkverk til trappu uttan fylgir við í søluni |

## Bygningur/ar

| | A | B | C |
|---|---|---|---|
| Byggiár | Fyrst í 1900-talinum | | |
| Ovara hædd | 28,5 m² sambært húsaskoðan | | |
| Miðhædd | 30,2 m² sambært húsaskoðan | | |
| Niðara hædd | 22,8 m² sambært húsaskoðan | | |
| Uttandura mát av ognini | 81,5 m² sambært húsaskoðan | | |

## Útreiðslur

| Rakstrarútreiðslur | Litrar/kwt | Kr./mðr. | Kr./ár |
|---|---|---|---|
| Orku-/oljunýtsla | Uml. 1.200 ltr. um árið | x | |
| El | | Uml. 150 kr. | |
| Annað | Húsini hava ikki verið nógv í brúk, men hava altíð havt hita á. | | |

Tikið inn

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Navn: | Petur Frank Jákupsson Holm | Tlf.: | +298 23 44 01 | Dagfesting: | 22-08-2023 |

Kunning og serligar viðmerkingar um ognina og sølutilfar annars

Upplýsingar í bústaðarlýsingini eru givnar eftir eigarans bestu sannføring. Tað kann ikki væntast, at eigarin hevur nøktandi kunnleika til standin og støðuna, hetta eitt nú innlit í rør-, hvs-, el- og kloakkeringsviðurskifti v.m., og má fyrilit takast fyri hesum, og tískil verður altíð mælt til, at áhugaðir keyparar hava serkøn við sær at sýna og gjøgnumganga ognina, áðrenn tey bjóða upp á ognina.

Um húsaskoðan og seljarans upplýsingar fyriliggja, er sera umráðandi, at áhugaður keypari lesur hesi skjøl gjølla, og kannar nærri viðmerkingarnar í hesum skjølum, serliga tá ið tað er frámerkt við KN, S3, S2 og S1, tí at keyparin í útgangsstøði ikki kann gera galdandi møguligar manglar, sum víst verður á í húsaskoðanini (støðufrágreiðingini), og seljarans upplýsingum.

Hesar viðmerkingar eru soleiðis ein kunning um standin á ognini, men eisini ein ábyrgdarfráskriving frá seljarans síðu, ið ikki er møguligt hjá keypara at koma afturumaftur við, eftir at ein avtala um keyp er gjørd.

Fyriliggur tilboð um eigaraskiftistrygging, er umráðandi, at keypari setir seg inn í rættarvirknaðin av hesum, og fylgjurnar av, um viðkomandi velur ikki at taka av tilboðnum. Rættarvirknaðurin av, at keypari velur ikki at taka av tilboðnum, er, at seljari er stillaður sum um tryggingin er teknað, meðan keypari er uttan deknað, og harvið átekur sær ein umfatandi váða.

Nærri kunning um hetta fæst eisini við at seta seg í samband við Skyn, og mæla vit annars altíð til, at keypari tekur av tilboði um at tekna eigaraskiftistrygging.

Dagfest:

Undirskrivað av seljara: